## Føroyska Kvinnufelagið í Keypmannahavn

Føroyska Kvinnufelagið var stovnað í 1944, tá onki samband var ímillum Føroyar og Danmark. Grunnurin hjá Føroyska Kvinnufelagnum hevur givið stuðul til fleiri endamál. Millum annað fingu lesandi, íð vóru í Danmark undir 2. veraldarbardaga stuðul úr grunninum. Eisini var grunnurin hjá Kvinnufelagnum grundarlag fyri einum húsið fyri føroyingar í Keypmannahavn.

Endamál felagsins er at savna føroyskar kvinnur í Danmark, umframt onnur, kvinnur og menn, íð hava áhuga fyri føroyskum viðurskiftum, til mentunaliga og sociala samveru.

Tá Kvinnufelagið í 2004 hevði seksti ára stovningardag vóru umleið 110 kvinnur limir í felagnum og talið hækkar.

Vit hittast oftast í Føroyahúsinum annað mánakvøld í hvørjum mánaði. Umframt limafundir skipar felagið fyri mongum tiltøkum, m.a. fyrilestrum av ymsum slag, jólahugna, útferðum og veitslum.

Hevur tú áhuga fyri at gerast limur í Kvinnufelagnum, kanst tú ringja til kassameistarin ella skriva til: plate@webspeed.dk

Nevnd:
Chirstin Plate, forkvinna, tlf. 45810049, fartlf: 28436532
Kristina Jensen, næstforkvinna, tlf: 44482804
Sheila Marr Westh, kassameistari, tlf: 39653351, fartlf: 30550546
Asley Højgaard, skrivari, tlf: 48174768
Sólklár Haraldsson, tlf: 33242600
Sylvia Levinsohn, tlf: 36709423
Ásvør Gásdal Sørensen, tlf. 48173261